# Lívið hjá einum Hvítanesdrongi

**Vit fara at lýsa lívið hjá einum hvítanesdrongi við søguni um Sigurd, son Dánjal**

Sigurd var føddur á Hvítanesi 9. juli 1917, og hann gjørdist 85 ára gamal.

Á eini eldrasamkomu í Ebenezer í 2002 greiddi Sigurd soleiðis frá:

"Vit vóru nógv børn har uppi á Hvítanesi. Vit spældu nógv. Men vit hjálptu til við øllum vanligum arbeiði sum torvi og hoyna.

Øll húsini á Hvítanesi høvdu neyt og lótu mjólkina til sanatoriið í Hoydølum. Á sumri, tá menninir vóru burtur til skips, vóru tað mest børnini, sum bóru mjólkina oman. Um veturin bar pápin mjólkina, tá tað ikki var útróðrarveður. Hjá heimamonnum kálvaði á vári og hjá sjómonnum á heysti. Tískil var tryggjað sanatoriinum mjólk alt árið. Samstundis var tryggjað sjómonnunum, at teir kundu vera heima, meðan kúgvin mjólkaði uppá tað mesta.

Eg fór í skúla 7 ára gamal, og vit høvdu eina ógvuliga góða lærarinnu, Karin Samuelsen. Hon stuðlaði fólki til at fara undir at fáa vatnleiðing á Hvítanesi. Alt vatn skuldi berast inn, eisinin til neytini, og vit høvdu tvær kýr. So tað var eitt stórt knoss.

Fyri at fíggja vatnleiðingina var skipað fyri lutaseðlasølu. Pápi gjørdi eina fullriggaða slupp, og mamma seymaði seglini. Hon varð burturlutað saman við bundnum og seymaðum lutum. Vatnleiðingin kom, og hetta gjørdist eitt stórt framstig fyri bygdina. Abbi legði vatnleiðingin inn hjá okkum.

Eg hevði lítlan skúlahug, so tann dagin eg fylti 14 ár, 9. juli, fór eg yvir í skúlan at siga lærarinnuni farvæl. Hon helt, at eg kundi ganga í skúla til summarferiuna, sum tá byrjaði á ólavsøku. Eg segði, at eg mátti hjálpa mammu við hoynum. Hon helt, at eg kundi ganga í skúla regndagarnar, men eg segði, at torvið skuldi berast inn eisini!

## Súklan frá Candor

Eg fór at arbeiða veg, sum tá var í gerð millum Hvítanes og Hoyvík. Doktor Lynge á Sanatoriinum hevði súklu, og tað var mín dreymur at fáa súklu. So tá ið eg hevði nokk av pengum varð súklan bíløgd frá Candor, Kompagnistræde 20. Teirra katalog kom í hvørt hús í Føroyum heilt upp til 60-ini. Eg var ógvuliga spentur.

Súklan kom, og Karsten Hoydal hjálpti mær at seta hana saman. Fyri at koma til Havnar mátti eg súkla gjøgnum hagan. Mourits, hoyvíksbóndin, hevði at mær, tí eg stygdi seyðin við súkluni! Dekkini høvdu 1 árs garanti, men hædd var ikki tikin fyri hagasúkling, og dekkini hildu heldur ikki. Eg skrivaði til Candor um málið, og mín sann, um eg ikki fekk nýggj dekk! Teir sendu eisini eina orðabók við, so møguliga komandi brøv kundu verða skrivað á betri donskum!

## Sloans varði

Gamli Sloan plagdi at ganga niðan á Hvítanes av og á fyri mína tíð. Ein dagin hann hevði verið har uppi, var so tjúkt í mjørka, at hann laðaði ein varða, sum varð kallaður Sloans varði. Hesin varðin er burturi nú og er horvin í onkrari vegagerð.

Einastu hús á Hvítanesi við tilknýti til brøðrasamkomuna var okkara og hjá Berint pápabeiggja, sum var giftur við Poulinu hjá Isalinu og gamla Knút skómakaranum. Systir Isalinu, Elspa, var gift við gamla Sloan, so hetta man hava skapað sambandið.

Kaldbaksmenn komu ofta til Hvítansar við báti. So fóru børnini við møtisboðum, og teir hildu møti inni hjá okkum."

## Til Havnar og til skips

Tá ið Sigurd var 15-16 ára gamal fluttu foreldrini til Havnar. Pápin sigldi og var nógv burtur. Tað var so strævið at búgva á Hvítanesi, og mamman ynskti at koma til Havnar. Dóttir Sigurd býr nú á Hvítanesi í barndómsheiminum hjá Sigurdi, sum tey hava bygt um.

Tá fór Sigurd sín fyrsta túr til skips við William Martin, sum Dánjal Petur Højgaard í Rituvík átti, og var hann við her í tvey ár. Sonur Dánjal Petur, Jørgen, var skipari fyrra árið og beiggi hansara, Niclas, seinna árið. Lítið visti Sigurd tá, at hann nógv ár seinni skuldi giftast við einum systkinabarni hjá teimum báðum!

Hetta var gott fólk at vera ímillum, og møti vóru ofta hildin umborð. Niðri undir við palstyttina fremst í lugarinum lá ein Bíblia og tvey blikk av "mannakornum", sum vóru lepar við skriftstøðum. Tey blivu nógv brúkt. Tá komið var inn, varð fyrst Dannebrog vundið á stong, og síðan Dúvuflaggið, flaggið hjá Bróðurringinum á Havinum. Vóru fleiri skip við hesum flaggi, leitaðu menn sær saman at halda møti.

Sigurd var eitt ár afturat til skips. Tá fór hann við Isabellu, ið Petur, beiggi hansara, hevði fingið at føra.

## Innifrystur í Danmark

Tá Sigurd var 19-20 ára gamal fór hann til Danmarkar at læra til bakara og kondittara. Heimsbardagin og Sigurd slapp ikki heim aftur.

Hendan tíðin í Danmark var sera ótrygg. Eins og í Føroyum var alt myrkalagt. Sigurd fór til arbeiðis kl. 4 um morgunin, og myrkaleggingin gjørdi tað myrkari enn annars. Meðan Sigurd ein morgun skundar sær til arbeiðis, veit hann ikki av, fyrr enn hann fær ein týskan byrsumúla í ryggin.

Tá var Sigurd kløkkur. Har var bara eitt at gera, at rætta hendurnar upp. Men tá hann vísti passið, sum váttaði, at hann arbeiddi um náttina, var alt í lagi. Annars hevði Sigurd tað gott niðri.

## Heim aftur

Tá ið kríggið endaði í 1945 fekk Sigurd sær ferðaseðil til fyrsta túr til Føroya við "Aarhus". Sigurd fekk tá eitt gullur, sum pápin hevði lovað, at hann skuldi fáa, um hann kom aftur í øllum góðum.

Sigurd giftist í 1948 við Naenu, dóttir Perlinu og Poul Amaliel Mikkelsen úr Syðrugøtu. Naena er av góðum bergi brotin. Í faðiættini er hon av Barbustovufólkinum. Abbin, Petur Pauli, var tiltikin fyri sína styrki. Og mamman var dóttir fyrstu hjún í Rituvík, Nicolinu og Per. Tey áttu 12 børn, so ein kann neyvan ímynda sær teirra knoss.



*Nena og Sigurd*



*Fyrsti Hvítanes, sum synir og abbasonur Dánjal lótu byggja*



*Hetta er partur av mynd í seinasta parti. **T.h.** er tað Dánjal av Hvítanesi. Um teir til vinstru vistu vit bert, at teir itu Johan og Jóannes og vóru av Eiði. Okkara heimildarfólk á Eiði halda, at hetta kunnu vera brøðurnir Johan Andreassen f. 19.9.1885 og Johannes Andreassen f. 10.7.1887.*

*Teir líkjast eisini so mikið nógv, at teir kunnu bera brøður. Teir hava verið javngamlir við Dánjal, sum var føddur í 1886, og tað síggja hesir eisini út til at vera. Í so fall er tað helst tann eldri, Johan, sum situr.*

*Teir vóru synir Grethu í Britustovu og Andreas Dam Andreassen. Teir hava sostatt verið brøður teir tveir beiggjarnar, sum druknaði á Eiðisvatni í 1904, og sum greitt varð frá í næstseinasta parti í røðini Hendur ið Sleptu.*

*Veit nakar meira vilja vit fegin frætta*